# Aðrar kvinnur eiga at sleppa framat

**- Vit eru líka nógv konufólk í kommununi sum mannfólk, og tí halda vit, at tað er náttúrligt, at konufólk eru líka væl umboðaði í bygda-ráðnum sum mannfólk, sigur Katrin Olsen, sum ikki stillar uppaftur á kommunuvalinum hesaferð, men hevur verið við í arbeiðnum at gera ein kvinnulista í Nes kommunu**

KOMMUNUVAL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Kvinnulistin í Nes kommunu hevur góðar vónir um at fáa fleiri kvinnur í bygdaráðið í Nes kommunu á valinum, 9. november*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Av sjey bygdaráðslimum í Nes kommunu, eru í løtuni tvær kvinnur. Tær eru borgarstjórin, Marjun Gaardbo og Katrin Poulsen. Nú hetta valskeiðið er við at renna út, hava tær báðar sitið í bygdaráðnum í tilsamans átta ár, men á valinum, 9. november, stillar hvørgin teirrar uppaftur.

Saman við Jansy Olsen, sum eisini hevur sitið í bygdaráðnum í Nes kommunu í átta ár – fram til valið 1996, hevur Katrin verið við til at skipað kvinnulistan, sum nú stillar upp við 11 kvinnum á valinum komandi.

Tað er Kvinnufelagið á Toftum, sum hevur gjørt listan, og formaður í felagnum er Jansy Olsen.

Seinastu 16 árini hevur kvinnulisti stillað upp til bygdaráðsval í Nes kommunu, og Jansy Olsen var fyrsta kvinnan, sum vald varð á hesum lista.

Fyrsta kvinnuliga umboðið í Nes kommunu annars var Kristina V. Andreassen.

## Aðrar eiga tørn

Katrin Poulsen, sum báðu ferðirnar er vald á kvinnulistanum, heldur, at nú eiga aðrar kvinnur at bjóða seg fram og taka við tí álitisstarvi, sum tað er at sita í einum bygdaráði.

– Eg haldi, at tað er rætt at geva øðrum møguleikan, tá ið tú hevur sitið í bygdaráðnum í átta ár.

Katrin sigur, at tað er spennandi og læruríkt at taka lut í kommunalum arbeiði, men tað krevur eisini tíð og orku.

– Eg havi fulltíðarstarv í dagrøktini, og vit hava bát og seyð. Tí helt eg, at tíðin var komin til at geva øðrum kvinnum møguleikan at sleppa fram at.

Málið hjá Kvinnufelagnum á Toftum, har Katrin eisini er limur, er at fáa eini 2-3 umboð í bygdaráðið á komandi vali.

– Jú, sjálvandi seta vit nøsina upp ímóti at fáa nøkur umboð vald, sigur Katrin.

Hon vísir á, at líka nógvar kvinnur eru í Nes kommunu sum menn, og í bygdaráðnum sita tilsamans sjey umboð.

– So, hví skulu vit kvinnur ikki seta nøsina upp ímóti fleiri umboðum, spyr hon sannførandi.

Katrin leggur aftrat, at felagið hevði ikki farið og gjørt ein kvinnulista, um tær ikki meina nakað við tað.

Sum Sosialurin hevur skilt, er eingin kvinna á nøkrum øðrum lista til bygdaráðsvalið í Nes kommunu hesaferð.

– Helen Højgaard var eisini á almenna listanum, men hon er nú við á kvinnulistanum, sigur Katrin.

## Mál eru rokkin

Katrin heldur, at fleiri mál, sum hon og onnur í bygdaráðnum hava lagt dent á seinastu átta árini, nú eru rokkin.

Í hesum sambandi nevnir hon eitt nú barnaansingina, eldrarøktina og skúlan, sum skjótt verður útbygdur.

– Tað er deiligt at vita, at fleiri av teimum málum, tú hevur virkað fyri, eru rokkin, sigur hon.

Spurd, um kvinnulistin hevur gjørt nakra serstaka valskrá, sigur Katrin, at hendan er í stoypiskeiðini, men er ikki liðug og almannakunngjørd enn.

– Men vit fara at stinga høvdini saman og tosa um, hvørji mál vit serliga skulu leggja dent á at røkka í einum komandi valskeiði, sigur hon.

Á kvinnulistanum á Toftum eru tilsamans 11 kvinnur, og listin er óheftur politiskt.

– Hetta eru kvinnur við ymiskum politiskum áskoðanum, men vit hava slett ikki spurt tær eftir, hvar tær standa politiskt. Málið hjá okkum er at fáa sum mest burtur úr í einum komandi bygdaráði – øllum borgarunum at gagni, og tí spyrja vit ikki eftir, hvar tær annars standa í politiskari merking.

Katrin Poulsen vónar at enda, at fólk í Nes kommunu fara at taka væl ímóti kvinnulistanum á valinum, 9. november.



*Sitandi borgarstjóri í Nes kommunu, er Marjun Gaardbo. Hon hevur sitið í bygdaráðnum í átta ár og stillar ikki uppaftur á komandi vali*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Fingu nógvan tosk á feskari gággu

**– Av umleið 12.000 pundum á tveimum setum, vóru eini 10.000 pund toskur, sigur Páll Højgaard, útróðrarmaður**

ÚTRÓÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Tað er nú ikki heilt rætt, at lítil og eingin toskur er at fáa.

Herfyri gjørdi ein útróðrarbátur á Toftum tveir góðar línutúrar í ein landsynning úr Borðuni.

Teir settu millum 22 og 28 stampar og fingu umleið 6.000 pund hvønn dagin.

Páll Højgaard, útróðrarmaður, sigur, at av hesum umleið 12.000 pundunum, vóru eini 10.000 pund toskur, meginparturin 3'arar og 4'arar.

Teir egndu bara feska gággu, og hann heldur, at hetta var høvuðsorsøkin til, at teir fingu so nógvan tosk.

– Vit egna at kalla bara feska gággu, og er eingin gágga, verður ikki egnt.

## Góður fiskur

Útróðrarmaðurin sigur, at fiskurin, teir fingu hesar báðar dagarnar, var í góðum holdum.

– Prísurin á toski er eisini góður, og tí vóru hetta tveir góðir túrar á leiðini eystur úr Dímun, sigur Páll Højgaard.

*- Hava vit onga feska gággu, verður ikki egnt, sigur Páll Højgaard, útróðrarmaður á Toftum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



# Geysir við í 2. útbjóðing

**Nøkur stór feløg við - onnur bjóða neyvan hesaferð**

OLJULEITING
*Jan Müller*



*Terji Hagevang*

Nú bert ein knappur mánaði er eftir, til 2. útbjóðing til oljuleiting við Føroyar letur aftur, er rættiliga óvist, hvussu mong feløg fara at søkja. Útmeldingarnar frá oljufeløgunum hava verið rættiliga varnar. Tað hevur tó líkasum ligið í luftini, at stóra bretska BP fer ikki at søkja hesaferð og sera óvist er við feløgum sum Amerada Hess og ENI. Tó ber illa til at koma til nakra avgjørda niðurstøðu, tí hesi feløg antin hava sagt frá, at tey fáa at síggja ella tey als ikki hava latið við seg koma.

Hinvegin eru onnur stór og meðalstór oljufeløg, sum hava boðað frá, at tey verða við. Hesi eru m.a. Statoil og Dong. Síðani eru tað uppaftur onnur, sum eisini kunnu hugsast at fara at bjóða. Hesi eru t.d. Shell og ChevronTexaco. Taka vit Shell, so hevur tað havt eina rættiliga fjølbroytna gongd á landgrunninum. Felagið er so við í loyvinum hjá BP frá 1. Rundu, men hóast BP hevur latið ljóðað, at tað ikki fer at bjóða í nýggjari rundu, so er ikki vist, at Shell nýtist at fylgja BP. Helst er tað beint tvørturímóti. Shell hevur gjørt seismiskar kanningar í summar og nakað herfyri flutti ábyrgdin av Atlantsmótinum yvir til Noregs. Taka vit so ChevronTexaco, sum hevur verið nógv frammi í seinastuni, so hevur stjórin har úttalað seg um, at fór ein boring við markið at vera positiv, so vóru eisini møguleikar fyri, at felagið fór at bjóða í føroyskum øki. Og tað er so nettupp tað, sum helst fer at henda, nú tað er komið fram, at felagið hevur gjørt eitt stórt oljufund.

Síðani eru tað smærri føroysku oljufeløgini, Atlants Kolvetni og Føroya Kolvetni, sum eisini tykjast at verða áhugað í nýggju runduni. Mest áhugavert fyri tey er sjálvandi, hvønn bólk við stórum oljufeløgum, ið tey sleppa at vera partur av. Tað kann so ganga báðar vegir. Men enn vita vit tað ikki.

Norsk-íslendska oljufelagið Geysir, sum eisini má sigast at hoyra til tey smærri oljufeløgini, hevur áður boðað frá, at tað helst fór at vera við. Nú váttar Terje Hagevang, stjóri, at Geysir verður við. Spurningurin er so bara, hvørji feløg fara saman í samtøk og hvørji verða einsamøll, um nakað. Og tá er spurningurin so, hvørjir møguleikarnir hjá eitt nú Geysir er fyri at finna sær samstarvsfeløg. Hetta við bólkum í sambandi við eina útbjóðing kann vera rættiliga avgerandi fyri úrslitið av útbjóðingini bæði fyri einstøku feløgini og fyri útbjóðaran, Føroyar.

Tá hugsað verður um, at talan er um nýggj øki, um djúpt vatn og um basalt, so er neyvan hugsandi, at feløg verða einsamøll. Heldur er hugsandi, at fleiri stór feløg finna saman fyri at fáa sum mest burtur úr. Spurningurin er tá, hvussu nógv av smærri feløgunum sum tey føroysku og so Geysir hava møguleika at kobla seg uppá umsóknir hjá teimum stóru og meðalstóru. Hetta vita vit 17. november.

Geysir má sigast at vera eitt av teimum smærri feløgunum og váttar Terji Hagevang, at teir í løtuni leita eftir øðrum feløgum at vera saman við. Eydnast hetta ikki, so útihýsir hann ikki, at teir søkja einsamallir. – Tað er enn ov tíðliga at siga, men vit fara at so at søkja einsamallir ella saman við einum ella fleiri øðrum um eina ella fleiri teigar.

Terji Hagevang dylur ikki fyri, at skulu teir fara undir at bora ein brunn, so verður neyðgut at vera saman við øðrum feløgum, men um talan fyribils bert verður um at gera kanningar, so sum at skjóta seismikk, so eru teir ikki ov smáir.

Uppá fyrispurning hvørja viðmerking hann hevur til tíðindini um, at stór fund helst eru gjørd beint hinumegin markið, so heldur Terji Hagevang, at hetta eru sera góð tíðindi. Fundini liggja so ikki so langt frá strukturum á føroyska økinum, sum Geysir arbeiðir við og fyrr hevur peikað út sum sera áhugaverd, og møgulig risastór gassfelt, eitt nú Durita-strukturin nakað norðari, á 62 stigum og longur inni á landgrunninum. – Tað er altíð gott at hoyra um nýggj fund, sum liggja nærhendis einum øki, sum man vil sleppa at kanna nærri. Eg vóni, at hetta fer at skapa størri áhuga fyri runduni.

# Rock-konsert í Kelduni

**Fyri fyrstu ferð verður rock-konsert hildin í nýggju hølunum hjá Kelduni í Skálabotni**

KONSERT
*Tíðindaskriv*

Tað verða bólkarnar Narnia úr Svøríki og I Am úr Føroyum.

Bólkarnir báðir hava nógvar royndir innan tónleik, og ikki minst man I Am vera bæði kent og væl umtókt her í Føroyum. Teir hava lutikið á Prix Føroyar og vunnu eisini Gospel-Prix'ið. Síðani hava teir ferðast runt landi og uttan fyri landaoddarnar.

Eisini hava teir givið tvær fløgur út, og hevur tann seinna av hesum selt fleiri enn 1.800 eintøk.

Narnia er úr Svøríki og er ein tann kendasti Rock Bólkurin í norðurlondum innan gospeltónleikin. Teir hava givið út fýra fløgur, sum allar hava verið sera vælumtóktar.

Tað er Adore Music, sum skipar fyri Konsertini í Skálabotni.

Danski familjuráðharrin, Henriette Kjær:

# Føroyingar eiga at hava fría fosturtøku

**Hóast forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, mælir donskum politikarum frá at blanda seg í fosturtøkumálið í Føroyum, gongur danski familjuráðharrin, Henriette Kjær, ímóti boðunum. Hon heldur, at føroyingar eiga at hava fría fosturtøku**

FOSTURTØKUMÁLIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Danski familjuráðharrin, Henriette Kjær, fýrir eftir øllum at døma ikki fyri at ganga stjórnarleiðaranum, Anders Fogh Rasmussen ímóti.

Hóast forsætisráðharrin gav greitt til kennar á tíðindafundinum á Christiansborg týsdagin, at hann helt ikki tað var rætt av donskum politikarum at leggja seg út í kjakið um fosturtøku í Føroyum, hevur Henriette Kjær gingið ímóti boðunum frá forsætisráðharranum.

Við netsíðuna hjá Danmark Radio sigur familjuráðharrin, at tað er ótíðarhóskandi, at føroyskar kvinnur ikki hava rættindi til fría fosturtøku.

– Eg haldi, at føroyingar eiga hava fría fosturtøku. Eg haldi tað er ótíðarhóskandi og einki samband við veruleikan í dag, har stórt sæð øll børn eru ynskibørn, at føroyskar kvinnur ikki hava møguleikan fyri fríari fosturtøka, heldur Henriette Kjær.

Í Danmark hava annars framsøgumenninir í javnstøðumálum hjá Vinstra, Danska Fólkaflokkinum og teimum Kristiligu verið av teirra áskoðan, at danir ikki eiga at blanda seg í føroysku viðurskifti.Hesum er Henriette Kjær ikki samd við.

– Tað er tað sama sum at eg viðmerki støðuna í USA, har George Bush stríðist ímóti rættindinum hjá kvinnum fyri fríari fosturtøku, sigur Henriette Kjær.

Hon heldur, at so leingi talan er um eina viðmerking og eina áheitan, er eingin trupulleiki við, at hon sigur sína hugsan um spurningin.

# Stak óheppi

**– Hatta er bert ein útsøgn frá einum persóni, og satt at siga vænti eg, at hugburðurin hjá Anders Fogh Rasmussen um at danir ikki skulu blanda seg, vigar tyngri í málinum, sigur Jóannes Eidesgaard**

FOSTURTØKUMÁLIÐ
*Páll Holm Johannesen*

Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, heldur lítið um, at útsagnirnar hjá danska familjuráðharranum, Henriette Kjær, á Danmark Radio mikudagin.

– Tað hevur verið ein greiður málsetningur hjá samgonguni, at vit skulu hava góð viðurskifti við Danmark. Higartil hevur ein felagsskapur og einstakir parlamentarikarar í Føroyum og Danmark útlalað seg, men tá talan er um ein danskan ráðharra, er støðan øðrvísi. Eg haldi tað er ótrúliga óheppi, at eitt umboð fyri stjórnina blandar seg í viðkvæma málið, sigur løgmaður.

Hann væntar kortini ikki, at útsøgnin hjá Henriette Kjær um, at føroyingar eiga at hava fría fosturtøku fer at broyta gongdina í málinum nakað.

– Hatta er bert ein útsøgn frá einum persóni, og satt at siga vænti eg, at hugburðurin hjá Anders Fogh Rasmussen um at danir ikki skulu blanda seg, vigar tyngri í málinum, sigur Jóannes Eidesgaard.

## Kjakast í Føroyum

Tað hevur lopið í øði í mangar føroyingar, at danskir politikarar seinastu vikuna hava sagt sína hugsan um fosturtøkumálið. Fleiri vilja vera við, at danir áttu ikki at blanda seg í føroysk viðurskifti.

Danir hava svarað aftur, at málið um fosturtøku er eitt mál, sum grundleggjandi fyri allar kvinnur í heiminum, og tí kenna danir seg hava rætt at siga sína hugsan í málinum.

*Væntar tú, at danir í framtíðini í størri mun fara at siga sína hugsan um grundleggjandi rættindini sum javnrættindi og borgararættindi?*

– Tað er ómetaliga ringt at siga hvar markið gongur fyri at siga sína hugsan. Eg haldi kortini tað er stak óheppið, at Henriette Kjær sum umboð fyri stjórnina kemur inn og leggur trýst á okkum. Tú skalt minnast, at málið um fosturtøku er eitt felagsmál, har lóggávuheimildin liggur í Danmark. Tað er kortini siðvenja fyri, at skal okkurt henda í málinum er neyðugt at broytingin kemur úr Føroyum, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.